Barnaheimið:

# Fyrstu familjurnar koma í næstu viku



*Barnaheimið skipaði í gjár fyri kunnandi fundi. Finnur Helmsdal greiddi frá virkseminum hjá heiminum*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Barnaheimið, sum fekk nýggjan leiðara 1. juli í ár, fer í næstu viku av álvara undir virksemi sítt. Tá koma fyrstu familjurnar inn á heimið**

BARNAHEIM
*Ingrid Bjarnastein*

Í gjár skipaði Barnaheimið fyri kunnandi fundi á Hotel Hafnia í sambandi við, at heimið veruliga byrjar virksemi sítt í næstu viku.

Finnur Helmsdal, leiðari á Barnaheiminum, greiddi frá endamálinum og virkseminum hjá heiminum.

Barnaheimið hevur nógv ár á baki. Tað var Nikolina Højgaard Simonsen, sum av fyrstan tíð setti heimið á stovn. Tað var í 1926, at hon tók tvey børn til sín í Rituvík, og smá 30 ár seinni vórðu hús bygd á trøðni hjá Emil Rein við Varðagøtu. Nøkur ár seinni var Nýggjastova bygdd uppí, sum í dag virkar sum ungdómsdeildin.

Barnaheimið er ein sjálvsognarstovnur. Í stýrinum fyri heimi sita níggju limir, har Fríða Patursson er formaður, og tað hevur hon eisini verið seinastu nógvu árini.

Sjálvt heimið hevur tríggjar deildir. Ungdómsdeildin, sum er fyri børn frá 10 til 18 ár, og har er pláss fyri seks børnum. Á familjudeildini verða tvær familjur tiknar inn í næstu viku.

– Pláss skal vera fyri fýra ella fimm familjum, men í fyrsta umfari taka vit tvær familjur inn, sigur Finnur Helmsdal.

– Ikki fyrr enn allar umbyggingarnar eru lidnar verða fleiri familjur tiknar inn.

Síðani er eisini ein deild til serlig átøk, og ætlanin er eisini at hava eina akutta móttøkudeild undir ungdómsdeildini.

– Tørvur er altíð á, at børn kunnu koma inn á heimið í tvær vikur ella líknandi inntil greiða er fingin á ymsum, og tí er gott at hava eina akutta móttøkudeild, greiðir barnaheimsleiðarin frá.

– Harumframt fara vit eisini at hava eina smábarnadeild undir familjudeildini. Vit meta, at tað hóskar seg betri, at hava hesa deildina undir familjudeildini, av tí, at tað ber ikki so væl til at hava smábørn saman við børnum, sum eru 15-18 ár.

### Kunningarferð

Á ungdómsdeilidini starvast átta fólk og á familjudeildini eru tey níggju í tali. Harafturat eru fýra til fimm fólk knýtt at deildini til serlig átøk, umframt vaskifólk, húsavørðar og skrivstovufólk.

– Fyrst í hesum árinum avgjørdi táverandi landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum, Sámal Petur í Grund, at full segl skulu aftur setast á Barnaheimið. Í februar varð ein arbeiðsbólkur settur at gera eitt tilmæli, og er tað út frá hesum tilmælið vit arbeiða í dag.

Síðani var farið undir at lýsa eftir fólki. Og fyri stuttum vóru leiðari, deildarleiðari og ein sálarfrøðingur á kunningarferð í Danmark. Finnur Helmsdal greiðir soleiðis frá um kunningarferðina:

– Vit vitjaðu fýra stovnar, og henda ferðin var ógvuliga lærurík og gevandi. Tað er spell, at vit ikki fóru á hesa ferðina áðrenn tilmælið varð skrivað, men tað gerst ikki við nú. Vit fingu nógv góð ráð frá teimum ymsu stovnunum. Millum annað ráddu allir stovnarnir okkum til at gera eina virkisætlan til starvsfólk okkara.

– Við at hava eina virkisætlan veit starvsfólkið, hvat tað er tey eiga at halda seg til, og hvat teirra arbeiðsøki er, og á henda hátt kunnu avtalur ikki verða brotnar. Men treyðugt so. Tað ber væl til at endurskoða virkisætlanirnar um nakrar mánaðar fyri síðani at gera broytingar.

### Onki dult

Familjudeildin er ætlað pørum við børnum, einligum við børnum og kvinnum, ið eru við barn.

Endamálið er at hjálpa familjunum við at mennast sum ein familja, og stuðla teimum. Harafturat at styrkja og stuðla foreldrini í teirra leikluti.

– Tá ein barnavernd hevur funnið útav, at ein familja átti at verið innskrivað á barnaheimið, hava vit fyrst ein forfund við leiðara, deildarleiðara og sosialum myndugleikum. Her verður greitt frá orsøkini, hví familjan átti at komið á heimið, og ikki minst, hvat avvarðandi myndugleikar vænta av uppihladinum, sigur Finnur Helmsdal.

– Síðani verður ein samstarvsavtala gjørd, sum foreldrini skulu undirskrivað. Hetta verður gjørt á innskrivingarfundinum. Á innskrivingarfundinum, verða foreldur kunnað um endamálið við uppihaldinum, og tey skulu eisini verða klár yvir tíðarætlanina. Tað verið seg, at tey skulu vita, hvussu leingi uppihaldið verður.

Innan tríggir mánaðar eru farnir, verður eftirmeting gjørd við møguligum broytingum.

Stórur dentur verður lagdur á, at alt verður gjørt soleiðis, at foreldrini vita, hvat gongur fyri seg. Onki skal dyljast fyri teimum. Hvørt orð, sum verður niðurskrivað, fáa foreldrini at vita um.

– Áðrenn familjan verður útskrivað av heiminum, verður frágreiðing skrivað um, hvat ætlanin er skal henda í framtíðini. Um barnið skal verða verandi á heiminum, ella líknandi. Hetta er tað mest avgerandi í allari prosessini, tí tað er út frá hesi frágreiðingini, at sosialu myndugleikarnir avgera, hvat skal henda víðari.

– Men onki verður gjørt uttan familjan veit av tí, slær Finnur Helmsdal fast.

### Tagnarskylda

Trivnaðarmálaráðið hevur sagt, at barnaforsorgarøkið skal virka meira professionelt. Finnur Helmsdal metir, at hugburðurin hesum viðvíkjandi er ógvuliga týdningarmikil. Eisini málið, ið sett verður, og tað at lýsa og dokumentera tey enstøku málini.

– Tað er alneyðugt at geva viðskiftafólki okkara eina virðiliga og rættvísa viðgerð. Arbeiðsuppgávurnar skulu takast í fullum álvara, og tagnarskyldan SKAL yvirhaldast.

– Eitt arbeiðsfólk á barnaheiminum skal lata vera við at hava nakra meining alment um, eitthvørt, ið hevur við heimið at gera. Hetta kann tykjast strangt, men soleiðis sleppur ein undan óneyðugum trupulleikum.

Sjálvt uppihaldið kann verða millum tríggjar og seks mánaðar. Ella so leingi tørvur er á tí. Tað vil siga, at tað kann eisini bara vera tvær vikur, men eisini meira enn seks mánaðar

Familjurnar hava bæði egið og felagsrúm, og børnini ganga í skúla sum vanligt. Um børnini eru so smá, at tey ganga á einum stovni, verður í hvørjum einstøkum føri mett, um tey kunnu halda fram ella ikki. Somuleiðis verður gjørt við arbeiðinum hjá foreldrunum. Eisini har verður mett um, hvørt foreldrini sleppa at arbeiða ella ikki. Bæði foreldrini sleppa ikki at arbeiða, og onkuntíð kann tað verða soleiðis, at pápin arbeiðir til dømis tríggjar ella fýra dagar um vikuna. Alt eftir, hvør leiklutur hansara er í uppihladinum.

– Vit ganga høgt uppí, at familjan skal hava ein bústað at venda aftur til tá upphaldið er yvirstaðið. Vit skulu ikki virka sum ein loysn upp á íbúðartrupulleikan, sigur Finnur Helmsdal.

Í komandi viku verður so av álvara farið undir virksemið á heiminum, tá fyrstu familjurnar koma inn. Tá fáa vit at síggja, hvussu heimið kemur at virka í framtíðini.



# Góður handil í Vágsbotni

**Ein kvinna keypti 70 nátar fyri 35 kr. stk. frá manni, sum seldi í Vágsbotni. Hon flutti seg nakrar metrar og seldi tað, hon hevði keypt ov nógv, útaftur fyri 50 kr. stk.**
**Soleiðis fekk hon bæði til sín sjálvs og kundi vinna nakrar krónur burtur úr tí, hon ikki skuldi hava heim við.**



*Lítið kom burtur úr hjá monnum, sum tóku náta í heyst. Tað viðraði ov illa, og tá ið veðrið endiliga gjørdist støðugari og betur, var fuglurin flogin.*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

HANDIL
*Vilmund Jacobsen*

Nátatíðin er nú gott og væl liðug og menn, sum hava verið á hesi veiði, hava vaskað bátar, neyst og íløt.

Hetta heystið verður tað, sum menn fara at minnast aftur á, sum eitt vánaligt heyst til fugl. Tað viðraði illa, og hjá teimum flestu kom lítið burtur úr. Nógvir strævnir dagar við lítlum og ongum fugli, har menn høvdu nóg mikið við at vinna upp land aftur, áðrenn dagurin var hálvrunnin.

Hildið verður tó ikki, at minni fuglur er flogin úr berginum og hevur verið á sjónum í ár. Orsøkin til vánaliga fongin er snøgt sagt veðrið.

Í fyrstuni varð hildið, at fuglurin var seinur á sjógvin, men ivasamt er, um tað nú er so.

### Veðrið fór við fuglinum

– Náti verpur frá umleið 16. mai og eina viku fram. Tað er veðrið sum í fyrsta lagi avger, nær ungin fer á sjógvin. Liggur hann við góðveðri, situr ungin leingi í berginum. Men er vindur fylgjandi dagar sum í heyst, flýgur nógv út í senn, og tá ið so teir góðu dagarnir koma, eru fuglurin farin, sigur Finnbogi Jacobsen í Nólsoy, sum letur illa at fonginum.

Hann heldur, at teir, sum fingu frægast burtur úr í Nólsoy í heyst, vóru útróðrarmaðurin, Juul M. Jacobsen og hansara menn.

– Eg haldi, teir mundu fáa einar 2000 nátar ella so, men teir tóku við tveimum bátum.

Teir frægastu dagarnar lógu bátarnir úr 100 uppí 150 og 200 fuglar, og tað meta nólsoyingar ikki at vera nógv.

– Onkran hendinga dag fekk onkur bátur einar 300 fuglar, og tað mundi vera tað mesta, nakar fekk. Finnbogi sigur, at nólsoyingar lata illa at og heldur, at hetta man vera eitt tað vánaligasta heystið til náta í mong ár.

– Veðrið er altavgerandi, og tað viðraði bara so ógvuliga illa í bestu nátatíð, sigur hann at enda.

### Kvinna keypti og seldi...

Sosialurin hevur skilt, at menn javnan seldu náta í Vágsbotni fyri 40 kr. stk., og at eingin trupulleiki var at sleppa av við fuglin. Onkur seldi tó fyri 35 kr., og í báðum førum seldu teir fuglin eftir fáum tímum.

Vit hava frætt um eina kvinnu, sum dugdi síni “ting” í Vágsbotni. Hon keypti 70 nátar frá manni fyri 35 kr. stk., flutti seg nakrar metrar, og seldi teir avstað aftur fyri 50 kr. stk. Sostatt slapp hon av við allan fuglin, sum hon ikki ætlaði sær heim við – og fekk tískil bæði uppí posa og sekk. Hon fekk til sín sjálvs og kundi tjena nakrar krónur uppá fuglarnar, hon keypti ov nógv.

# Kanna dýpið

HAVNAÚTBYGGING
*Dagfinn Olsen*



*Skamt frá bryggjukantinum í Va´gi flýtur ein arbeiðsflaki í hesum døgum. Tað er Landsverkfrøðingurin, ið kannar dýpið í samband við projektering av djúpvatnshavn*

Í Vági flýtur ein flaki í hesum døgum útfyri bryggjuøkinum. Menn síggjast arbeiða á flakanum, eins og ymisk útgerð er umborð og á bryggjuni sæst eisini tekin um virksemi.

Talan er um, at Landsverkfrøðingurin kannar dýpið, upplýsur Jógvan Krosslá, býráðsformaður í Vági.

Hetta verður gjørt í samband við eina møguliga útbygging av havnalagnum, so talan verður um eina djúpvatnshavn.

Jógvan Krosslá hevur ikki stórvegis viðmerkingar til málið enn, tí enn er hetta eitt mál, sum er í hondunum á øðrum myndugleikum. Men hann sigur, at ymsar kanningar eru gjørdar frammanundan, men at hesar kanningarnar verða gjørdar í samband við at kanna dýpið og hvussu botnurin er. Hetta verður gjørt í samband við projektering.

Tað, ið sigast kann um hetta mál, sum enn er á byrjanarstigi, er, at Løgtingið hevur játtað nakað av peningi og at málið annars er í Landsstýrinum. Hvussu leikur víðari fer fram, vil tíðin vísa. Løgtingsmenn fara í komandi viku á ferð suður til Suðuroyar at kunna seg um samferðsluviðurskiftini sum heild í oynni, nú orðaskifti hevur verið um hesi viðurskiftini og møguligar ábøtur.

Men so leingi arbeiði fer fram við havnarlagið í Vági, er neyðugt hjá skipum og bátum at hava eyguni við flakanum, ið liggur skamt frá bryggjukantinum.

# Nornagestur og Kolumbus á beding

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Partrolararnir, Nornagestur og Kolumbus, sum vanliga leggja veiðina upp til Sandoy Seafood, eru í løtuni á beding á Tórshavnar Skipasmiðju. Skipini hava ligið nakrar dagar, og væntandi fer bedingsarbeiði at taka einar tvær vikur aftrat.

Á Sandoy Seafood hava tey tó nóg mikið at gera, tí virkið keypir fisk á uppboðssølu til virkingar á Sandi og í Skopun.

Nakað av útróðri er eisini, bæði á Sandi og í Skopun, og frægastu bátarnir koma uppí eini 1200 pund á snellu. Meginparturin av veiðini er toskur 3 og 4.

Enn er línuútróðurin ikki byrjaður, men tað verður helst nakað skjótt, nú liðið er so mikið út á heystið.